## DAGSINS MEINING

# Justitsmorð

Eitt justitsmorð er tað sama sum ein rangur dómur. Tá ósek fólk verða dømd at verða revsað, verður sagt, at rætturin hevur framt justitsmorð. Í Føroya rætti er framt justitsmorð. Maður og kona vórðu fyri nøkrum árum síðan dømd til fongsulsrevsing fyri at hava framt kynsliga misnýtslu av børnum.

Eftirfylgjandi er avdúkað og prógvað, at bæði maður og kona vóru ósek. Ein triðji persónur hevði eftir øllum at døma lokkað børn at bera falskan vitnisburð. Fólkini vórðu í síni tíð dømd eftir ákæruritinum. Eystari Landsrættur hevur síðan staðfest, at fólkini vórðu ósek.

Fólk standa spyrjandi. Eru Føroyar ikki eitt rættarsamfelag? Hvar er rættartrygd borgaranna? Hvat er hetta fyri nakað? Hvussu kundi hetta henda? Almenningurin hevur enn ikki fingið nøktandi svar frá ákæruvaldinum. Tá spurt verður í fjølmiðlunum, verður vikið uttanum og fokuserað uppá hetta, at málið alt fyri eitt varð tikið uppaftur, tá løgreglan hevði varhugan av, at her ruggaði ikki rætt. Fyrr var illa, hava vit huga at viðmerkja, og vit hava hug at leggja afturat, at hetta er væl skiljandi, tí leiklutur ákæruvaldsins í hesi søk er lítið at reypa av.

Tað er eygsæð, at her er farin fram sorgarleikur, sum fer at nerva øll avvarandi fyri lívið. Samfelagið fer at rinda skaðabøtur, og tað er sum tað skal vera, men ongar skaðabøtur kunnu grøða tey sálarligu mein, sum eitt slíkt mál elvir til hjá teimum, sum hava verið offur so ella so.

So mikið um sjálvt málið. Tað, sum nú frá einum samfelagsligum sjónarmiði er umráðandi, er, at almenningurin fær at vita, hvussu hetta kundi henda. Harnæst má og skal almenningurin fáa vissu fyri, at slík justitsmorð ikki henda aftur. Væl eru vit øll menniskju og tað er sum mangan tikið til menniskjansligt at gera mistøk. Hinvegin mugu vit sláa fast, at slík mistøk skulu ikki kunna koma fyri. Slíkt skal ikki kunna henda. Tað má og skal bera til við tí vitan, tøkni og sálafrøði, sum partar i rættarsøk hava til taks í dag at forða fyri slíkum syndarligum mistøkum. Danska løgmálaráðið, ákæruvald, løgregla og dómsvald skylda okkum eina frágreiðing og eiga samstundis at veita Føroya fólki trygd fyri, at slík mistøk ikki henda aftur.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hans Pauli Strøm blástemplar lógarbrot

**Annita á Fríðriksmørk**



**§ 8** í. Til tess at røkja tað dagliga arbeiðið, setir kommunan ein leiðara fyri dagstovnin ella dagrøktarskipanina við náms-frøðiligari útbúgving". Hetta gjørdi Tvøroyar Býráð ikki. Hóast annar av umsøkjarunum hevði námsfrøðiliga útbúgving. Til hetta reagerar Hans Pauli Strøm við at biðja býráðið taka starvssetanina aftur. Og lovar samstundis kommununi, at hann fer at gera sítt til, at lógin verður broytt, soleiðis at tað sum Tvøroyrar býráð ger verður í lagi framyvir.

Men hvat ger býráðið so, jú sjálvandi ger hon eftir harraboðum og tekur starvsetanina aftur. Men tá ið man nú hevur við ein so "medgjørligan" landsstýrismann at gera, so setir mann sjálvandi sama persón í starv aftur. Í eitt fyribils starv! Hvat tá!

Fyribils, til lógin verður broytt, - síðani í fast starv!

Men hvør sigur at lógin verður broytt. Tað er ikki nakað sum landsstýrismaðurin avger. Tað er nakað sum løgtingið avger. Og landsstýrismaðurin skal ikki rokna við at handan greinin í lógini einsamøll verður broytt, so hon passar inn í ein handil, sum landsstýrismaðurin hevur sett í gongd.

Skal lógin broytast, haldi eg, at tað átti at verði gjørt eftir, at lógirnar um dagstovnar og dagrøkt og fólkaskúlalógin vóru eftirmettar. Við tí endamálið at pedagogar og fólkaskúlalærarar fingu høvi at samstarva nógv meira. Tá vildu hesi starvsfólk, havt nógv lættari við at komið inn á øki hjá hvørjum øðrum við teimum fjølbroyttu dygdum, sum hesi - í felag og í hvør sínum lagi - hava. Men hetta tekur tíð, og verður ikki gjørt í einum handavend. Her eru fyri tað fyrsta ymisk sjónarmið innan tinggátt, har lógin skal broytast og góðkennast, og í aðru atløgu eru tvey sterk fakfeløg, sum væl saktans verða tikin við upp á ráð.

Og so leingi alt hetta ikki er gjørt, skal landsstýrismaðurin halda seg til galdandi lóggávu, og lata verða við at loyva nøkrum fyribils loysnum, sum beinleiðis stríða ímóti lógini!

Eg fari tí í hesum sambandi at heita á løgmann, sum hevur eftirlit við landsstýrismonnunum, at kanna:

**1. um hann heldur, at landsstýrismaðurin í almannamálum hevur umsita hetta málið á fuldgóðan hátt:**

a. Tá ið hann góðtekur, at kommunan setir ein fyribilsleiðara, sum ikki hevur ta útbúgving, sum lógin ásetur.

b. Tá ið hann gevur kommununi óbeinleiðis lyfti um, at lógin verður broytt til gagns fyri handfaringina hjá kommununi.

Tað undrar ikki sørt, at Jóannes Ejdesgaard, sum fyri tað fyrsta er løgmaður, harnæst er av Tvøroyri, og enntá valdur har suðuri, onki sum helst ger við handilin millum landsstýrismannin í almannamálum og Tvøroyrar kommunu, men velur stilltigandi at góðtaka at lógarbrot soleiðis snýkja seg inn á okkum.

# Tøkk Fregnir

**Jústinus Eidesgaard**
*journalistur*



Tað eru sorgarboð, at fátæki føroyski blaðheimurin er eitt blað fátækari. Og júst soleiðis kennist tað, nú avgerð er tikin um at steðga Fregnir med alla. Blaðið var eitt frískt lot í føroyska blaðheiminum og fólkini aftanfyri frískar nálir sum sveiggjaðu í hesum loti.

Sum journalistur og sum fyrrverandi formaður í Føroya Blaðmannafelag, harmist eg stórliga, at tað ikki eydnaðist Fregnum lívi lagað. Idealistarnir aftan fyri Fregnir, við Jonhardi Mikkelsen á odda, megnaðu at skapa nakað nýtt. Eitt tjakblað, sum fór djúpari enn hini bløðini og eitt blað sum meinti nakað og sum tordi at standa við sínar meiningar, sum ikki var fjøtrað av at skula tekkjast so mongum sum gjørligt. Eitt blað, sum ikki nýttist at fortelja lesarunum, at tíð indini tað bar vóru álítandi.

Sum fyrrverandi tíðindaleiðari á Sosialinum minnist eg, at vit vóru spentir til hvørja útgávuna. Hvat mundu teir nú hava funnið uppá hesir vitleysu loysingarmenn. Vit vóru rættuliga purraðir út, tá Sjúrður Skaale skríggjaði matseðilin út í útvarpslýsingum dagarnar undan útgávudegnum. Hetta var frískt og nýtt og spennandi.

Í uppseting legði Fregnir seg beinanvegin fjórðingar frammanfyri hini bløðini, og teir megnaðu at halda hesa frástøðu til seinastu útgávu. Skilji ikki rættuliga, at tað almenna bara skal lýsa í Dimmu og Sosialinum, og harvið geva hesum privatu fyritøkum ein fyrimun framum aðrar, sum vilja hava ein greiðari hugsjónarligan grundvøll at íðka okkara grundlógartryggjaða skrivifrælsi á.

Uttan at taka støðu til loysing contra samband, so sleppa vit ikki uttanum, at loysingarparturin í Føroyum er ein fittur partur av føroyingum, og hesin partur er vorðin fátækari, nú Fregnir hevur lagt árarnar inn.

Sum sannur kristin, so átti eg at hýst eins væl fíggingum sum vinum í mínum húsi. Eitt faktum er tó, at eg hóast, eg veit hetta, so eri eg fyri tað allarmesta eri umgivin av vinum her heima hjá okkum. Tey, sum slett ikki kunnu semjast við mær, hvat eg standi fyri hugsjónarliga ella átrúnaðarliga, tey halda seg vanliga burtur frá mínum føðingardøgum.

Nú mold er løgd yvir Fregnir, so er vandi fyri, at tey á loysingarsíðuni eru vorðin heimleysari í fjølmiðlahøpi, og hevur tað almenna ein part av ábyrgdini fyri hesum við einum lýsingarpolitikki, sum einsrættar okkara grundlógartryggjaða skrivi og talufrælsi, so eiga teir at hugsa seg um enn einaferð.

Oman fyri standandi reglur hava onki við mína politisku støðu, eg nýti mín borgarliga rætt til at halda hesa fyri meg sjálvan.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Fer Jógvan við Keldu skeivur?

**Schandorff Vang**

Útlendingamálið tekur nógva tíð í hesum døgum, men tykist landsstýrismaðurin ikki at skilja støðuna - og kanska eisini gloyma partar av útlendingalógini.

Svarið til Anitu á Fríðriksmørk í Sosialinum 21. september eigur at skelka mangan lesara. Tað má vera okkurt, sum treingir sera spakuliga inn.

**Endamálið við umsókn um uppihalds- og arbeiðsloyvi**

Tað er kanska nevnt fyrr, men lat meg taka aftur í aftur.

Allir útlendingar (ikki norðurlendingar), sum koma til Føroya at arbeiða skulu søkja um uppihalds- og arbeiðsloyvi. Fyrr enn játtandi svar er komið frá Útlendingastýrinum, kann útlendingurin ikki byrja at arbeiða.

Við umsóknini skal vera ein arbeiðsgevaravváttan, sum ikki er eldri enn 30 dagar. Vanligt er, at arbeiðsgevaravváttanin er galdandi eitt ár fram, t.v.s. fyri tíðarskeiðið, sum útlendingurin søkir um loyvi til.

Flestu útlendingar koma til Føroya fyri at forvinna pening og royna eina aðra tilveru, sum er betri enn í heimlandinum. T.v.s. at hesir útlendingar bert eru knýttir til Føroyar við arbeiðsloyvinum og skulu sostatt av aftur landinum, um onki arbeiði er at fáa.

Tá landsstýrismaðurin sigur, at lógin er soleiðis, *"at arbeiðsloyvi eru fyribils...Loyvini galda vanliga eitt ár í senn. Tá enda loyvini. Vil útlendingur verða longur, skal hann søkja av nýggjum"*, so er tað púra rætt. Men hvat hendir?

Útlendingurin søkir av nýggjum, "tí hann vil verða longur", og fyri at umsóknin - undir øllum umstøðum - kann vinna frama, skal ein váttan frá arbeiðsgevara fylgja við. Honum skal verða játtað arbeiði fyri tíðarskeiðið, hann søkir um uppihaldsloyvi.

T.v.s. arbeiðsgevarin hevur valt at seta henda útlendingin í starv, tí arbeiðsgevarin metir, at tørvur er á arbeiðsmegini.

Tað, sum landsstýrismaðurin í roynd og veru ger, er at strika hesa arbeiðsgevaravváttan. Hann sendir bræv til fútan um, at hann metir, at brúk er ikki fyri slíkari arbeiðsmegi í landinum. Hesi boð fylgja við til Útlendingastýrið, sum vanliga fylgir boðunum úr Landsstýrinum. Í slíkum føri verður svarið til umsøkjaran eitt nei.

**Upprudding**

Eisini sigur landsstýrismaðurin *"...so hevði eg ikki havt annað í at velja enn at latið uppruddingararbeiðið halda fram, tí vit hava skyldu til at rætta tað, tá vit síggja at nakað er blivið skeivt í mun til lógina."*

Álvaratos - hvat er tað fyri upprudding talan er um? Skal samfelagið dustsúgvast og reinsast fyri útlendingar?

Ger landsstýrismaðurin sína skyldu, tá hann uttan nakað ógildar ein arbeiðsgevaravváttan, sum er grundarlagið undir umsókn um uppihaldsloyvi?

Kannar landsstýrismaðurin gjøllari umstøðurnar hjá útlendingunum, áðrenn hann ógildar arbeiðsgevaravváttanina? Tað sýnist ikki so, sambært teimum tveimum reglunum, sum hann skrivar sum fylgiskriv til Útlendingastýrið - tær báðar reglurnar, sum kunnu oyðileggja tilveruna hjá umsøkjaranum.

Tað sýnist ikki, sum um landsstýrismaðurin hyggur eftir grein 26 í Útlendingalógini. M.a. í stk. 1, pkt. 1 - *udlændingens tilknytning til det danske samfund* (samstundis eisini føroyska samfelagið), ella pkt. 5 - *udlændingens manglende eller ringe tilknytning til hjemlandet eller andre lande, hvor udlændingen kan ventes at tage ophold, ella pkt. 6 - risikoen for, at udlændingen uden for de i § 7, stk. 1 og 2, nævnte tilfælde vil lide overlast i hjemlandet eller andre lande, hvor udlændingen kan ventes at tage ophold.*

Grein 7, stk. 1, er um flóttafólk. Stk. 2 umfatar vandan í at vera sendur aftur til heimlandið ella tað landið, sum framhaldandi uppihald skal verða í. M.a. vandan fyri *"...umenneskelig eller nedværdigende behandling..."*

Hevur landsstýrismaðurin kannað, hvørjar umstøður útlendingarnir koma í, um teir fara aftur til heimlandið? Er nakað kannað, um teir ikki enda júst í støðuni, sum førdi til, at teir leitaðu sær eina "betri" tilveru í Føroyum - ella um støða teirra versnar?



**Tað hongur ikki saman**

Tosað hevur eisini verið um, at ein orsøkin er tað nógv vaksandi arbeiðsloysið í landinum. Tað er eisini munur á, hvussu man lesur nógv vaksandi arbeiðsloysi. ALS hevur kunnandi hagtøl á heimasíðuni, sum greitt vísa, hvønn veg tað ber.

Talvan 1992-2002 vísir syrgiligu støðuna, sum vit høvdu. Har sæst, at talan er um stórt tal av fólki. Sjálvgjørda talvan vísir støðuna frá januar til og við juni 2002-2004.

Um vit rokna í prosentum fáa vit høgt tal, men er talan um tal av fólki, so er myndin heilt ein onnur.

Samanumtikið vísir myndin greitt, at vit hava størri niðurgongd í maijuni í ár enn í 2002 og 2003. Hvussu kann tað hanga saman við, at landsstýrismaðurin sigur, at okkum ikki tørvar útlendsku arbeiðsmegina?




# Eingin orsøk til rumbul

**Heðin Mortensen**
*formaður í mentamálanevndini í Tórshavnar kommunu*



Síðstu dagarnar hevur dúgliga verið skrivað um broytta aldursbýtið á børnum á dagstovnunum hjá Tórshavnar kommunu. Bæði býráðspolitikarar og starvsfólk hava sagt sína hugsan, og alt gott um tað.

Vit vilja tryggja øllum børnum í kommunalu dagrøktini so góð viðurskifti sum gjørligt, og ei heldur ivast nakar í, at okkara dugnaligu starvsfólk gera sítt besta, so børnini eisini kunnu hava tað gott.

Júst tí kann tað undra, at so nógv verður gjørt burtur úr broytta aldursbýtinum, tí samanlagt snýr tað seg hóast alt bara um fimm børn. Foreldur standa óivað eisini undrandi, tí tey kenna væl ikki til annað, enn at børnini hava tað gott. Hetta er jú heldur ikki ein kollvelting av allari skipanini, men bara ein regulering, einki annað.

Sjálvandi skulu øll vera hoyrd, ikki minst starvsfólkini, men eg haldi tað vera skeivt, at farið verður út í fjølmiðlarnar at viðgera málið, heldur enn at fáa tað loyst innanhýsis, bæði politiskt og umsitingarliga. Hetta er ein spurningur um samstarv og um at fáa tosað um tingini.

Tveir av tjóðveldismonnunum í býráðnum hava heldur ikki ligið á latu síðuni, men hava funnist dúgliga at gjøgnumførdu reguleringini. Hetta dugi eg ikki at lesa sum annað enn bíligt valagn.

Sum fyrr nevnt, situr Jógvan Arge sjálvur í mentamálanevndini og hevur verið við at samtykt hetta málið. Er talan um eina »skeiva avgerð«, ja, so má Jógvan vælsaktans fyrst taka í egnan barm.

Leivur Hansen hevur eisini havt møguleikar at gjørt vart við seg á rætta stað, tí hann situr í fíggjarnevndini, sum hevur viðgjørt málið í sambandi við fíggjarætlanina. At hann nú kemur til aðra niðurstøðu og brádliga hevur hug at profilera seg aftaná, má bara vera ein staðfesting av svøvntungum arbeiðslagi.

Eftir stendur, at bæði mentamálanevndin og fíggjarnevndin hava tikið undir við málinum, sum tað fyriliggur. So kunnu Jógvan og Leivur rópa og rumbla, sum teir vilja, men avgerðin er eisini teirra.

Vónandi verður málið ikki gruggað enn meira av blaðskriving, tí eg dugi ikki við mínum besta vilja at síggja, hvørja nyttu tað skal gera. Hetta er eitt mál, ið eigur at verða viðgjørt og loyst innanhýsis. Og tað verður bert gjørt við at tosa um tingini og at samstarva um tey - ikki tað øvugta!

# Mentanin bløðir

**Leivur Hansen**
*býráðslimur*



Tungt er at byggja upp. Skjótt er at bróta niður.

Hesi vísdómsorð fullu mær í huga, tá eg um dagarnar frætti um sparingarnar hjá landinum á kvøldskúlaøkinum næsta ár.

Tað hevur ikki júst verið nakað løtuverk hjá landi og kommunum at fáa kvøldskúlaskipanina upp á tað støði, hon nú eftir tógvið stríð og strev var komin.

Men hvat uppliva vit so nú?

Jú, mín sann, um teir ikki eru í fullari ferð við at máa støðið undan henni aftur.

Avleiðingarnar av fráboðaðu sparingunum verða, at hundraðtals fólk missa møguleikan fyri at fáa undirvísing á kvøldskúla í vetur.

Og sum ikki eina ferð eru tað tey veikastu okkara millum við tí størsta tørvinum, sum verða við sviðusoð.

Í Havn td. (har játtanin til kvøldskúlan er skerd við 400.000 kr.) hevur verið neyðugt at taka alla undirvísing fyri brekað og allar próvtøkulærugreinir av skránni, tí játtanin bert røkkur til ta vanligu kvøldskúlaundirvísingina.

Útreiðslubýtið millum land og kommunu er her 50 prosent, meðan landið einsamalt fíggjar serundirvísingina og próvtøkulærugreinirnar, sum nú altso verða strikaðar.

Í summar stóðu musikkskúlarnir fyri spariskotum, og hóast teir tá sluppu við skrekkinum, er neyvan síðsta harmaljóðið komið haðani enn. Og sum skilst er støðan á bókasøvnunum ikki stórt mætari.

Tað er harmuligt ferð eftir ferð at noyðast at ásanna, at hvørja einastu ferð, spariknívurin er á lofti her á landi, so bløðir mentanin.

Aðrastaðni royna tey harafturímóti - ikki minst í ringum tíðum - júst at hjúkla og fjálga um mentanina og tað, sum har uppi í hongur.

Løgið, at tað bara skal loysa seg hjá teimum og ikki hjá okkum.

Leiðarin á Tórshavnar Kvøld-, Ungdóms- og Listaskúla hevur heitt á løgtingið um at taka støðu til, um Føroyar hava ráð til kvøldskúlaundirvísing ella ikki.

Vónandi fær hann eitt klárt og greitt svar og ikki bara ein slutur fyri ein slatur, sum fryktandi tíverri er fyri.